KVINNUR Á TINDUNUM

Í FÍGGJARHEIMINUM

Vit hitta Evy Jacobsen, forstjóra í Betri-samtakinum, og Turið Finnbogadóttir Arge, rakstrarstjóra í BankNordik, til eitt prát um at vera á tindunum í føroyska fíggjarheiminum.

Slips. Nógv slips. Myrkablátt jakkasett. Stór og rein fundarborð. Kontrollerað og tilvitað flenn um blanka fundarborðið, annars bara álvarsamt og øgiliga gløgt prát. Pengar. Homogen starvsfólk. Nógv glas og gott útsýni. Smáir Georg Jensen-bakkar við luksuskaramellum og brúsvatni í glasfløskum. Svartir skógvar. Rólig ljóð og køligur hiti. Turrislig tøl. Stór fólk og stórar avgerðir, sum næstan eingin annar skilur. Og bara menn – tó kanska onkur einstøk kvinna ímillum.

Hetta eru umleið teir fordómar, eg havi havt um bankaheimin. Í roynd og veru havi eg ongantíð hugsað serliga nógv um bankar og tey fólkini, sum arbeiða har, men hetta er í øllum førum tann myndin, eg havi havt – og kanska tú eisini hevur eina mynd, sum minnir um.

Men eg eri blivin eitt sindur klókari. Eg havi prátað við Evy Jacobsen, forstjóra í Betri-samtakinum, og Turið Finnbogadóttir Arge, rakstrarstjóra í BankNordik, um tað at vera kvinna í hesum køliga bankaheimi, sum kanska ikki er so køligur kortini.

Onnur er ikki serliga málrættað, og hin gjørdist mamma sum bert 19 ára gomul. Tær báðar raðfesta familjuna høgt, men tær báðar elska at arbeiða. Og í dag sita tær á ovastu rók í bankaheiminum í Føroyum. Hvussu eru tær komnar upp hagar? Er tað einsamalt? Og eru veruliga so fáar kvinnur har, sum vit kanska ganga og ímynda okkum?

EFTIR **KÁRU BJARNADÓTTIR JAKOBSEN** MYNDIR **AMY HANSEN**

EG HAVI ONGANTÍÐ HAVT EIN BRENNANDI DREYM UM AT VERÐA STJÓRI

Hon hevur arbeitt við orku og í fíggjarheiminum. Hon hevur samstarvað við stórar vinnulívskundar, verið við til at børsskráseta fyritøkur og sitið í alskyns nevndum. Í dag er hon forstjóri í Betri-samtakinum. Men hon er meira ein nørdur enn stjóri, sigur hon.

EVY JACOBSEN
FØDD: 17/10-1973
MAKI: Finnur Vang
BØRN: Mattias (18) og Karin (13)
BÚSTAÐUR: Miðvágur
ÚTBÚGVING: cand.merc.mat.

Hon sær ikki so stjóralig út. Ikki tí, av okkum báðum sær hon avgjørt stjóraligari út enn eg – eg havi valt einar stórar, stívar sneakers, sum hóast eitt sportligt snið hava givið mær eina bløðru á høgra hæl.
Hon gevur mær ikki eitt smíl, tá ið eg komi inn á skrivstovuna. Men eitt flenn. Og tað er ikki, tí hon er tann áleypandi týpan. Als ikki. Hon er bara hjartalig, haldi eg.
Eg havi bara hoyrt um Evy. Ongantíð møtt henni. Og hon hevur eisini verið nokkso trupul at fáa fatur á. Hon er ein upptikin dama. Men ókey, annað hevði eisini verið løgið, tá ið hon nú er forstjóri í Betri-samtakinum.
Og kanska júst tí, at hon hevur verið eitt sindur trupul at fáa eina avtalu við, væntaði eg eina eitt sindur stívliga, stjóraliga madammu, sum milt, men formelt bjóðar mær vælkomnari. Tað ger Evy ikki. Eg fái eitt stórt, blítt flenn, og eitt rættiliga energiskt lógvatak, tá ið hugsað verður um, at hon beinanvegin greiðir mær frá, at hon ongantíð hevur roynt slíkt áður, og tí kanska er eitt sindur nervøs.

MEIRA NØRDUR ENN STJÓRI

Sjálvt um vit sita ovast í einum banka-/tryggingar-/pensjóns-bygningi, so kennist tað, sum um vit sita í einum hugnaligum køki í Miðvági. Eg ivist onga løtu í, at hon er ein góður stjóri, men eg merki einki tekin um, at hon roynir at vera meira stjóralig enn neyðugt. Og hon flennir hart, títt og hjartaliga, og hon brúkar meira orku at flenna eftir, hvussu óáhugaverd hon sjálv heldur, at hon er, enn at tykjast áhugaverd.
Hon hugsar seg um eina løtu. Hon gníggjar lógvarnar spakuliga saman og sigur, at hon ongantíð hevur havt eitt brennandi ynski um at verða stjóri.

– Í roynd og veru havi eg altíð hildið, at leiðarastørv eru ov umsitingarlig, og tí havi eg ongantíð verið miðvís tann vegin. Eg havi ongantíð havt eitt fikspunkt – at eg skal blíva stjóri ella fáa onnur fín heiti. Eg havi bara altíð roynt at gera mítt arbeiði til fulnar og kastað meg yvir tað, sum eg tími at gera.
Í student hevði hon støddfrøði- og alisfrøðibreyt, og tá ið hon fór til Danmarkar at lesa, valdi hon støddfrøði og búskap.
– Støddfrøði kann tykjast eitt sindur keðiligt og kanska heldur ikki brúkiligt. Og tað vóru eisini fleiri aðrar útbúgvingar, sum ljóðaðu munandi meira spennandi. Til dømis umhugsaði eg at velja altjóða búskap og mál, men eg endaði við at velja tað, sum fall mær lættast – eg hugsi, tú røkkur longri við at leggja tína orku í tað, tú dugir og tímir, heldur enn at seta nøsina eftir einum ávísum starvi ella heiti.
Í staðin fyri at miða eftir einum stjórasessi, hevur hon tikið eitt róligt fet í senn. Altíð sett seg væl inn í tingini. Og nørdast. Og hon fer at flenna, tá ið hon sigur, at hon enn biður um at sleppa fert eftir tí. Tí tað er so nógv, sum kann broytast.
– Tá ið eg fór at lesa, søgdu fleiri við meg, at eg átti at lisið verkfrøði, tí eftirspurningurin eftir verkfrøðingum var so stórur. Men tá ið eg var liðug at lesa, var trupult hjá verkfrøðingum at fáa arbeiði. So vit eiga kanska at vera nokkso varin við at planleggja ov nógv – og kanska serliga, um hugurin ikki fylgir við.
Hon skundar sær tó at leggja aftrat, at onnur hava tað øvugt – tey hava eitt mál og fara eftir tí, og tað er teirra drive – soleiðis eru vit so ymisk.

KVINNAN Í MANNFÓLKAHEIMINUM

Á síni yrkisleið hevur Evy altíð verið umgird av monnum. Tað byrjaði í student á støddfrøðiligu og alisfrøðiligu breytini, seinni tá hon fór at lesa støddfrøði og búskap og so eisini tá ið hon fór at arbeiða, fyrst innan orku og síðani innan fíggjarheimin.
– Tað hevur mær í veruleikanum dámt væl. Og um eg skal vera púra erlig, so havi eg ongantíð kent, at eg havi verið kvinna í eini mannfólkaverð. Eg havi ikki kent tað, sum nakar at síggja excel-ørkini, so hon kann nørdast við sínum starvsfólkum.
– Eg má duga betur at sleppa júst tí partinum og lata míni starvsfólk um tað – men tað er eitt sindur trupult at lata vera, tí eg elski tøl.
Vit tosa eina løtu um hetta at vera málrættað. Hon heldur, at nógv ung í dag stressast við tankan um, at tú alt lívið siktar eftir einum máli og bara hevur hugt niður á meg, ella at eg ikki havi fingið somu møguleikar, tí eg eri kvinna. Til dømis var eg forkvinna hjá skipasmiðjuni MEST og havi eisini sitið í nevndini hjá bæði Vága Floghavn og Eystur- og Sandoyartunnlar, tá ið hesi stóðu framman fyri størri byggiverkætlanum – og ongantíð havi eg hildið meg verið fyri mismuni, tí eg eri kvinna og hini menn.

Hon greiðir frá, at tá ið hon sum nýútbúgvin kom til Føroya og skuldi samstarva við tilkomnar vinnulívsmenn, var tað ongantíð nakar trupulleiki. Ein tann fyrsta uppgávan, hon fekk, var at seta eitt fastognarfelag á stovn saman við roynda vinnulívsmanninum, Hans Mortensen, sála. Og hon kendi tað ongantíð, sum um hon var verri ella betur viðfarin enn næsti maður.
– Eg minnist tó frá míni tíð innan fyri orku-vinnuna í Danmark, at vit onkuntíð skuldu taka myndir, og tá varð eg knappliga sett undir liðina á formanninum. Og tá hugsaði eg "hví siti eg her?", men tað var fyri at vísa tær fáu kvinnurnar, sum vóru við í arbeiðinum.
Hon flennir. Tenninar koma til sjóndar, og eyguni gerast smøl. Og hon sigur, at støðan í roynd og veru er umvend í Betri Banka í dag. Tí í dag er býtið seks kvinnur og tríggir menn í nevndini hjá Betri Banka. Og seinast, tá ið mynd skuldi takast av nevndini, vórðu menninir settir fremst á myndini.
Hetta samsvarar ikki ordiliga við ta fatanina, sum eg og ivaleyst eisini fleiri onnur hava av bankaheiminum. Tann heimurin er svartur, gráur og hvítur og fullur av monnum. Men her situr hon – forstjórin – í síni kremlittu blusu, myrkalillaðum buksum og við eini tunnari gullketu um hálsin. Og hon flennir – upp á tann góða mátan.
Eg fái mær en slurk av tenum og eina daim-karamellu. Og hóast hendan kæra karamellan larmar meira, enn eg hevði ætlað, bilar tað einki, tí her er onkursvegna heimligt at sita og drekka te og eta sjokulátu.
– Í dag er tað soleiðis, at kvinnur fáa betri útbúgving enn menn og sostatt eisini betri útlit til at fáa góð størv. So eg havi sagt við sonin, at hann má gera sær ómak, tí annars fer hann at detta niður ímillum, tí konufólkini eru nógv dugnaligari.
Andlitið smílist. Ljósa, stutta hárið skyggir. Eg fái eitt lítið blunk, tá ið setningurin kemur hálvflennandi um varrarnar.

FAMILJULÍV OG ARBEIÐSLÍV

Hon sigur, at hon ikki hevur so nógv at fortelja. Hon er heppin, sigur hon. Hon er uppvaksin við foreldrum og beiggja og annars allari familjuni rundan um seg í Sørvági. Hon møtti Finni, sum hon í dag er gift við og eigur tvey børn saman við, tá hon var 16 ára gomul. Og í dag búgva tey fýra í Miðvági.
– Eg havi ikki ferðast heimin runt. Eg havi heldur ikki runnið marathon. Upp á tann mátan eri eg rættiliga óinteressant. Eg elski mítt arbeiði, so tað raðfesti eg høgt.

Hon greiðir frá, at hon rættiliga tíðliga setti sær fyri, at hon ikki skuldi detta í ta felluna, sum vit konufólk sigast at detta í – at vit bera okkum undan at taka við teimum møguleikunum og avbjóðingunum, sum vit fáa, tí vit ikki hava tíð ella førleikar til tess. Men Evy tók av. Umframt fulltíðarstarv hevur hon eisini sitið í fleiri nevndum, sum eru farnar við nógvari frítíð.

Hon vendir lógvunum uppeftir og yppir øksl, men við einum smíli á varrunum.

– Maðurin plagar at siga, at arbeiðið hjá mær er sum mítt frítíðarítriv. Og tað passar. Eg elski at sita og nørdast.

Tað eru nógv, sum siga, at tey elska sítt arbeiði. Men eg havi ikki møtt so nógvum, sum tosa so heitt um sítt arbeiði sum Evy. Í mun til hvussu lítillátin og rólig, hon annars tykist at vera, havi eg ongantíð møtt einum, sum tosar so energiskt og fjálgt um excelørk. Hetta fær meg at hugsa um allar tær løturnar, eg sjálv havi hugt í eitt blankt excelark. Eg havi ongantíð funnið útav, hvussu tað skal brúkast, og hvussu smart tað er – míni excelørk hava tíverri altíð verið tóm.

Aftur at arbeiðinum stendur familjan ovast á listanum. Og hon sigur, at hon brúkar nógva tíð saman við manninum og børnunum báðum.

– Eg elski at vera saman við teimum. Eg eri so ræðuliga góð við tey. Og fyri meg er tað meiningsfult og lívsjáttandi at vera nakað fyri tey.

Tá ið tú bæði ert forstjóri og nevndarforkvinna, arbeiðir tú nógv, og tað er ofta soleiðis, at páska-, summar- og heystferiur fara upp í fundir.

– Men sjálvt um eg arbeiði nógv, raðfesti eg familjuna høgt, og eg royni altíð at vera tilstaðar. Eri eg til arbeiðis, ja, so arbeiði eg. Og eri eg heima, so eri eg har.

Sjálvt um hon sjálv sigur, at har ikki er so nógv at siga um familju og uppvøkstur, so sigur hon rættiliga nógv kortini. Setningarnir eru erligir og ókontrolleraðir, og teir fáa meg at hugsa um allar teir tilvitaðu og kontrolleraðu setningarnar, sum vit ofta bara siga – vit siga ofta eina hundans rúgvu, sum ljóðar væl, og sum vit eiga at siga, sum tó ikki rína við. Men nú fangi eg nærum hvønn tann einasta setning. Eg veit ikki, um tað er, tí hon er nýggj og ikki so miðlavand. Ella eri tað eg, sum havi gjørt ov nógvar samrøður við politikarar. Men her er okkurt reint og ektað við mátanum, hon tosar uppá, sum eg vóni ikki bráðnar, tess longur hon situr í sjónliga stjórasessinum.

> „... og um eg skal vera púra erlig, so havi eg ongantíð kent, at eg havi verið kvinna í eini mannfólkaverð. Eg havi ikki kent tað, sum nakar hevur hugt niður á meg, ella at eg ikki havi fingið somu møguleikar, tí eg eri kvinna ...“

Altíð tann rætta jólagávan

Við gávukortinum frá SMS gevur tú altíð eina hóskandi gávu.

Kortið kann brúkast sum vanligt gjaldskort í øllum handlunum í SMS.

Tú velur upphæddina.
Hon kann vera úr 50 kr. upp í 3000 kr.

Keyp kortið á Marknaðardeildini í SMS ella á heimasíðu okkara: **sms.fo**

sms

(Ó)SJÓNLIGU KVINNURNAR

– Sonurin spurdi meg nú ein dagin: *"Hvussu leingi eru fólk vanliga stjóri á einum sovorðnum stað?"*
Hon flennir og sigur, at hon hevur lisið, at miðal er umleið seks ár.
Hon hyggur beint upp á meg og sigur, at hetta var nakað, hon hugsaði nógv um, áðrenn hon tók við sum forstjóri.
– Tá ið eg eri liðug her, so er tað út. Og tað er kanska eitt sindur ræðandi. Ella í øllum førum er tað høgligari við einum meira vanligum arbeiði í bankanum, sum eg hevði áðrenn. Tað er tryggari. Men hinvegin dámar mær væl at kasta meg út í nýggjar avbjóðingar. Mær dámar væl at hava ávirkan og at vera við til at gera góðar broytingar.
Og so kann hon altíð detta aftur á spennandi tøl, sum hon kann nørdast við. Hon flennir. Og tosar rættiliga lætt um framtíðina, sum kanska ikki altíð fer at vera á tindinum.

> Vit eru kanska við til at taka motivatiónina frá yngru kvinnunum við at vera ósjónligar. Tí fyri meg hava tað ongar forðingar verið við at vera kvinna í bankaheiminum, um tú bara torir at taka av møguleikunum, sum tú fært. Men vit skylda kanska komandi ættarliðnum at vísa okkum eitt sindur meira fram.

– Beint nú trívist eg væl í starvinum. Tað er nógv at seta seg inn í, tí enn veit eg ov lítið um pensjóns- og tryggingarøkið, so tað er ordiliga spennandi.
Hon viðgongur tó, at hon enn ikki ordiliga hevur vant seg við at vera sjónlig.
– Tá ið tit til dømis ringdu og spurdu, um eg vildi vera við, hugsaði eg, at tað er so lætt at siga nei. Men jú, eg skal siga ja, tí vit kvinnur siga ofta nei, og vit hava eina ábyrgd at vera sjónligar fyri øðrum kvinnum.
Hetta fær meg at hugsa, at kynsbýtið kanska ikki er so ójavnt, sum vit ofta halda – tí kanska fleiri kvinnur sum Evy dáma betur at halda seg ósjónligar – og tí síggja vit menn. Nógvar menn.
– Vit eru kanska við til at taka motivatiónina frá yngru kvinnunum við at vera ósjónligar. Tí fyri meg hava tað ongar forðingar verið við at vera kvinna í bankaheiminum, um tú bara torir at taka av møguleikunum, sum tú fært. Men vit skylda kanska komandi ættarliðinum at vísa okkum eitt sindur meira fram. Tí tað gera okkara mannligu starvsfelagar.

Eg spyrji hana at enda, hvussu hon vil vera sum stjóri.
– Erlig, svarar hon beinanvegin. Og so sigur hon eitt sindur beint fram, at um fólk hava rós uppiborið, ja, so skulu tey hava tað. Men hon vónar eisini, at hon fer at geva onkrar skolur, tá ið fólk ikki hava gjørt sítt arbeiði nóg væl. Eg flenni eitt sindur innantanna – hetta var tann kanturin, eg bíðaði eftir. Hóast hon tykist fitt sum eitt lamb, er hon so mikið erlig, at eg ivist onga løtu í, at har fer onkur skola at koma av og á. Men hon fer uttan iva at vera uppiborin.
Eg hyggi eftir klokkuni. Tíðin rennur. Eg takki fyri prátið, tí eg veit, hon skal hyggja eftir dóttrini spæla fótbóltsdyst. Hon er spent, sigur hon. Og flennir.

Hvussu við einum jólabýarskáa í

EDINBURGH?

Mána- og hósdag

Visti tú, at flogtíðin bert er ein góðan tíma? Býarskáar til Edinburgh ganga sum heitt breyð, og tað er ikki uttan orsøk, tí har er nógv at taka sær til bæði, tá ið tað kemur til innkeyp, mentan, siðsøgu, matmentan við meira.

Vitja kenda Edinburgh Castle ella far ein ræðutúr í Edinburgh Dungeon. Spáka tær eftir stóru innkeypsgøtuni Princes Street ella síggj býin frá ovaru hædd á einum Hop on/Hop off bussi. Edinburgh er í øllum førum eitt gott val til tína næstu ferð!

Bílegg á atlantic.fo

Atlantic Airways Vága Floghavn FO-380 Sørvágur Tel. 34 10 00 www.atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS

10263

KYN ER HVØRKI EIN FYRIMUNUR ELLA EIN VANSI

Á arbeiðsplássinum hevur hon altíð fingið somu møguleikar sum sínir mannligu starvsfelagar. Men viðhvørt fær hon fordómsfullar spurningar ella viðmerkingar frá fólki, sum kanska ikki hava vant seg við, at tað er Turið, sum er nógv burtur við arbeiðinum, meðan maðurin ger børnunum matpakkar. Hon heldur, at vit skulu miða eftir javnstøðu á arbeiðsplássum og eisini heima, tí vit hava brúk fyri báðum kynunum á báðum støðunum.

Hon er bara 19 ára gomul. Hon er júst liðug við 3. g. Og við sínum ljósa, blanka hári og sínum rundu ljósabláu eygum stendur hon mitt í verðini og bjóðar framtíðini vælkomnari. Men í mun til fleiri aðrar gentur í hennara aldri hevur hon eitt pinkubarn í føvninginum. Christina. Gentan, ið vanliga hevur sjálvsálit, er minni brasin í nýggja mammuleiklutinum. Og sjálvt um hon hevur ein dreym um bæði útbúgving og arbeiði, fær hon fleiri viðmerkingar frá fólki um, at nú verða hennara møguleikar avmarkaðir. Við lítla barninum kann hon ikki tað sama sum hini – tí soleiðis er at vera ung mamma, siga tey.

JA TIL STÓRAR MØGULEIKAR

Hon kemur gangandi móti mær. Hon er í einum longum, skyggjandi myrkagrønum kjóla, sum næstan røkkur niður á gólvið. Og við hennara opna og smílandi andlitsbrái bjóðar hon mær vælkomnari inn í hesa glaskúluna. Stóri, rundi BankNordik-bygningurin á Oknarvegi í Havn.
Her er nógv glas. Næstan alt er glas. Kalt og gjøgnumskygt. Bygningurin er rundur upp á tann fýrakantaða mátan. Gólvteppið er myrkt, borð og stólar eru eisini myrk, og fasadurnar eru betong ella glas. Vit fara upp gjøgnum einar trappur og so inn á skrivstovuna hjá Turið.

Hon byrjaði í bankaheiminum sum 25 ára gomul, og longu sum 28 ára gomul fekk hon bjóðað starvið sum HR-stjóri fyri alt samtakið. Hetta var, meðan hon var við barn og skjótt skuldi eiga yngstu dóttrina. Og síðani hevur hon millum annað havt ábyrgd av marknaðardeildini, havt ábyrgd av vinnuøkinum í Føroyum og í dag er hon rakstrarstjóri.
– Tað hevði verið nokkso nærliggandi at sagt nei til hesar stóru møguleikarnar, tá ið eg nú havi eina útbúgving innan roknskap og fíggjarstýring. Tá ið eg fekk bjóðað HR-stjórastarvið sum 28 ára gomul, visti eg lítið og einki um økið. Men eg tók av. Eg tordi at siga ja. Og akkurát tað er avgerandi – kanska serliga fyri okkum kvinnur, tí vit hava ofta ov lætt við at siga nei, tá ið vit fáa møguleikan.
Men ”ja” til stórar møguleikar hevur hon ofta sagt. Og tað eru júst hesi ”ja”, sum hava fört hana til starvið, sum hon hevur í dag. Hetta fær meg at hugsa um øll tey ”nei”, sum eg ofta havi sagt, og um hvussu avgerandi hesi smáu orðini eru.
Hon greiðir frá, hvussu umráðandi tað hevur verið fyri hana at taka av teimum

TURIÐ FINNBOGADÓTTIR ARGE
FØDD: 22/8-1982
MAKI: Otto Andreasen
BØRN: Rakul, Christina og Aleksandra
BÚSTAÐUR: Havn
ÚTBÚGVING: Cand.merc.aud og MBA

møguleikunum, sum stinga seg upp – eisini tá ið tú ikki grynnir. Tí tá hon sum 19 ára gomul fekk Christinu og samstundis eisini fleiri viðmerkingar um, at hon ikki longur kundi tað sama sum aðrar 19 ára gamlar gentur, birtist ein lítil logi í henni.
– Tá fekk eg knappliga enn størri hug at fara allan vegin. Eg vildi vísa míni dóttur, at tað ber til! Tað ber væl til at fáa sær eina útbúgving, eitt gott arbeiði og vera mamma samstundis – eisini ung mamma.
Hon hyggur beint upp á meg. Eygnabráið er fast, treiskt og avdúkar eitt kappingarmenniskja. Og meðan fleiri kanska lurta eftir og akta tær avmarkingarnar, sum onnur geva, bleiv mótgongdin ein enn størri motivatión hjá Turið at bróta mynstrið, sum onnur kanska royndu at seta hana í.

ARBEIÐSLÍV OG FAMILJULÍV

Og hetta hevur heldur ikki verið ein trupulleiki – altso, tað at vera ung mamma, nema sær útbúgving og hava krevjandi størv. Gamaní eru summar løtur strævnari enn aðrar, tá ið tú hevur trý børn og hevur havt fleiri leiðandi størv. Men tað snýr seg um raðfestingar, sigur hon.
– Eg nái ikki alt. Tað eru fleiri føðingardagar og tiltøk í skúlunum hjá børnunum, sum eg ikki havi verið til, tí eg antin havi sitið heima og skrivað uppgávu ella verið uttanlands við arbeiðinum.
Men sjálvt um hon ikki nær allar føðingardagar og øll jólaklipp í skúlunum hjá børnunum, raðfestir hon familjuna høgt. Tað er ikki tí, at arbeiðið verður tikið framum – hon raðfestir bæði.

– Annað nýtist ikki at útihýsa hinum. Og tá ið fólk spyrja meg, hvussu eg kann vera so nógv burtur frá børnunum, sum eg eri við mínum arbeiði, spyrji eg ofta, um tey høvdu spurt meg sama spurning, um eg var ein maður. Tí tað er so avgjørt ikki óvanligt í Føroyum, at annað av foreldrunum er nógv burtur.
Við arbeiðinum ferðast Turið javnan til Danmarkar og nakrar ferðir um árið til Grønlands.
Hon hevur onga fiksa uppskrift uppá, hvussu hon blandar fínar bankafundir í útlondunum við kreativar matpakkar hjá børnunum – heima hjá teimum er tað maðurin, sum ger matpakkarnar, meðan hon hevur onkra aðra uppgávu. Hon smílist. Hon sigur bara sum er, at bæði familjulív og arbeiðslív fylla nógv í hennara lívi – tað er ikki meira hokuspokus enn so.

Eg veit ikki, um tað er hennara ungi aldur í mun til allar hennara royndir, hennara greiði máti at tosa uppá ella okkurt heilt annað, men har er okkurt friskligt yvir henni. Tá ið eg siti yvir av henni her og hoyri hennara kláru setningar, fari eg at hugsa um ein køligan, ljósabláan svimjihyl ein góðan vármorgun. Eg veit ikki, um assosiatiónin kemst av hesum akvariumsarkitekturinum, sum herjar hesi ár, har alt skal vera úr glasi – at tú helst skalt kenna teg sum ein priviligeraðan gullfisk, tá ið tú ert í skúla ella til arbeiðis. Eg haldi kanska heldur, at hendan friskliga kenslan kemst av, at vit sita í einum banka (nakað, sum eg einki veit um) og tosa um eitt evni, sum vit hava fløkt í so nógv ár: Hvussu kunnu kvinnur sameina familjulív og eina snarkarrieru? Og heldur enn at liva upp til turru fordómarnar, eg havi um bankaverðina, og heldur enn at geva mær fiksar loysnir um, hvussu tað ber til at vera ein modernað kvinna, svarar hon spurningunum rættiliga einfalt. Og onkursvegna er tað ein lætti at hoyra.
– Tá ið eg eri burtur við arbeiðinum, er tað maðurin, sum tekur sær av øllum heima. Og tá ið eg eri heima, eru vit felags um uppgávurnar. Og veitst tú hvat, døturnar hava ikki upplivað annað enn, at tað fungerar fínt.
Hon skundar sær at leggja aftrat, at hon hevur stóra virðing fyri teimum kvinnum og monnum, sum eru heimagangandi. Men hon ger púra greitt, at tað at raðfesta arbeiðslívið høgt merkir ikki neyðturviliga, at tú ikki kanst raðfesta familjulívið.
Átta ára gamla dóttirin kemur inn á skrivstovuna. Hon er komin við mammu síni til arbeiðis í dag. Hon fer yvir móti henni og teskar henni okkurt. Turið flennir eitt sindur og sigur, at hetta verður liðugt um eina løtu.

> Kyn hevur ongantíð verið eitt issue. Heima hava vit ongantíð tosað um, at vit eru soleiðis og gera soleiðis, tí vit eru gentur – hvat kvinnur eiga at gera, og hvat menn eiga at gera. Tað hevur ongantíð verið nakað, sum eg, mínar systrar ella døtur ikki kunnu, tí vit eru kvinnur.

Hon setur seg á høga kontórstólin hjá mammu síni og hyggur inn í sløkta skíggjan. Føturnir dingla og mangla einar 70 cm í at røkka niður á gólvið. Hon klikkir nakrar ferðir við músini. Konsentrerað. Og fnisar eitt sindur. Turið hyggur eitt sindur umberandi, men flennandi yvir á meg.

KYN IKKI EITT ISSUE

Turið eigur tríggjar systrar og eisini tríggjar døtur. Alt hennara lív hevur hon verið umgird av kvinnum. Hetta tykist sum ein andsøgn til myrka og stíva bankaheimin. Eg undrist eitt sindur á, hví hendan unga mamman, sum bara eigur systrar, velur at fara eftir bankastjórasessum.
– Kyn hevur ongantíð verið eitt issue. Heima hava vit ongantíð tosað um, at vit eru soleiðis og gera soleiðis, tí vit eru gentur – hvat kvinnur eiga at gera, og hvat menn eiga at gera. Tað hevur ongantíð verið nakað, sum eg, mínar systrar ella døtur ikki kunnu, tí vit eru kvinnur.
Hon hugsar seg um eina løtu og heldur so áfram.
– Eg dugi ikki at siga, um tað er, tí eg eri uppvaksin uttan beiggjar og synir – eg veit ikki ordiliga – men heima hjá okkum hevur kyn ongantíð verið ein fyrimunur ella ein vansi. Vit eru tað, vit eru, og hava teir førleikar, vit hava – og júst tað eigur at vera avgerandi fyri, hvørji størv vit fáa og fara eftir – og ikki okkara kyn.
Hon leggur aftrat, at hon ongantíð hevur upplivað, at hon ikki hevur fingið eitt starv ella verið fyri mismuni, tí hon er kvinna. Og hon vísir á, at tað í roynd og veru eru rættiliga nógvar kvinnur í teimum leiðandi størvunum í bankanum.
Í BankNordik í Føroyum eru umleið helvtin av øllum leiðandi størvunum mannað við kvinnum.
Sjálvt um fleiri av leiðarunum í bankanum eru kvinnur, viðgongur hon tó, at tað kundu verið enn fleiri kvinnur í ovastu leiðslu- og nevndarstørvunum í Føroyum. Og tað er helst ein strukturellur trupulleiki, sigur hon.
– Tað byrjar í veruleikanum við barnsburðarfarloyvi. Eg veit væl, at hetta er ein viðkvæmur spurningur, og eg hevði ynskt, at tað ikki var neyðugt við kvotum millum kynini, men eg eri bangin fyri, at í okkara samfelag broytast tingini ikki, fyrr enn kvotur til dømis verða ásettar. Tí kynini eru ymisk, og arbeiðspláss hava brúk fyri bæði kvinnum og monnum, eins og okkara børn hava brúk fyri báðum.
Hon steðgar á. Hugsar seg um eina løtu. Hetta er, sum hon sjálv sigur, ein viðkvæmur spurningur.
– Vit mugu royna at fáa so nógvar vinklar sum møguligt í einum arbeiðsplássi, og tí er umráðandi við ymiskum fólki. Men um arbeiðsplássið er dominerað við til dømis monnum, krevur tað nakað eyka at seta eina kvinnu. Soleiðis er tað bara, og tí eiga vit at vera tilvitað um hesi mynstrini – bæði á arbeiðsplássum og heima.

FRAMTÍÐIN

Eg dugi væl at síggja, at hon hevur tað, sum ein góður leiðari eigur at hava. Men hóast hon er hendan leiðaratýpan, merki eg ikki hesa frástøðuna – hon tosar í eygnahædd. Kanska tí hon tosar so eldhugað um sítt arbeiði, síni børn og javnrættindi millum kynini.

Vit báðar sita við eitt borð, sum er innast í horninum í hennara skrivstovu. Eg vendi út móti vindeyganum. Ella, einum heilum veggi úr glasi. Tað oysregnar, og vindurin hálar í hoyggið uttanfyri. Men hóast vindurin ýlir uttanfyri, er her fjálgt. Og við sínum klára tónalagi og heita smíli vendir hon orðunum móti framtíðini. Hon yppir øksl.

- Eg trívist ordiliga væl í starvinum, sum eg havi nú. Eg kann búgva í Føroyum, hava familju her, men samstundis sleppi eg at arbeiða saman við fólki í øðrum londum. Og akkurát tann parturin er motiverandi fyri meg – at røkka út um landoddarnar.

Hon greiðir frá, at av tí at BankNordik hevur deildir í bæði Danmark og í Grønlandi, sum hon í stóran mun hevur ábyrgd av, verður arbeiðsøkið stórt og fjølbroytt – talan er um fleiri marknaðir – og júst tað dámar henni væl.

Eg spyrji, hvar hon sær seg sjálva um nøkur ár. Hon veit ikki ordiliga. Henni dámar væl støðuna, hon er í – sum er ein blandingur av Føroyum og útheiminum, ein blandingur av arbeiðslívi og familjulívi og av kvinnum og monnum.

Vit reisast. Hon tekur í hondina á dóttrini, og tær fylgja mær síðani út til bakdyrnar í bankanum. Og eg hugsi við mær sjálvari, at sjálvt um pinkubarnið er skift um við tríggjar døtur, og sjálvt um unga mamman nú er royndari, vil hon enn vísa verðini, sær sjálvari og sínum gentum, at tað ber væl til.

> „... tá fekk eg knappliga enn størri hug at fara allan vegin. Eg vildi vísa dóttrini, at tað væl ber til! Tað ber væl til at fáa sær eina útbúgving, eitt gott arbeiði og vera mamma samstundis – eisini ung mamma.“

IDEmøblar

Uppi á Hálsi · Tórshavn · Tel 354680 · www.ide.fo